# AB vil í bestu deildina

**Við at fáa Rúna Nolsøe og Allan Mørkøre sigur AB-formaðurin, at teir royna at fyrireika seg best møguligt til komandi kappingarárið**

AB
*Jákup Mørk*



*Við at gera sáttmála við Allan Mørkøre og Rúna Nolsøe, sum á myndini eru liðfelagar, vónar AB-formaðurin, at teirra lið fær tilført bæði impulsir og royndir*

Sum vit skrivaðu í blaðnum í gjár, so var væntandi, at AB mánakvøldið gjørdi sáttmála við Rúna Nolsøe og Allan Mørkøre, sum altso báðir verða partur av felagnum komandi kappingarárið. Rúni sum spælandi venjari, og Allan sum royndi spælarin, ið eisini kann geva venjaranum eina hond.

Tað kundi bent á, at argjamenn komandi ár ætla sær at stevna beina kós móti Formula-deildini, og hetta er so ikki nakað, sum verður avsannað av Tórálvi Stenberg, formanni í AB.

- Ætlanin hjá okkum er sjálvandi, at vit vilja liggja so ovarliga, sum tað er gjørligt. Fyri einum sekssjey árum síðani settu vit okkum sum mál, at AB við tíðini skuldi gerast ein partur av bestu føroysku deildini, og vit hava støðugt gjørt framstig síðani tá. Vit hava nú verið í aðru deild í trý ár, og vit hava støðugt amast móti toppinum, uttan at vit tó eru komnir heilt upp.

*Vil tað siga, at tit eru ónøgdir um úrslitini, sum felagið hevur fingið í ár?*

- Nei. Vit hava verið framúr væl nøgdir. Ikki minst tí vit halda hetta vera mest sum optimalt, tá smali spælarahópurin verður havdur í huga. Men við Rúna og Allani vóna vit, at vit kunnu tilføra hópinum nakrar nýggjar impulsir, samstundis sum vit eisini fáa tveir sera royndar spælarar á liðið, sigur hann.

Formaðurin vil ikki staðfesta, at uppflyting til bestu deildina er eitt krav til nýggja venjaran, men at hetta er málið, tykist lítil ivi vera um.

- Málið er sjálvandi, at vit vinna teir dystir, sum vit spæla næsta ár. Og gera vit tað, so standa vit sjálvandi sum vinnarar av deildini, sigur hann, áðrenn hann leggur afturat, at kappingin verður hørð.

- Eg ivist ikki í, at talan komandi ár verður um eina sera javna kapping. Vit eru kanska fyrsta felagið, sum boðar frá, hvussu vit vilja styrkja hópin, men eg ivist ikki í, at fleiri onnur eisini gera tað sama. Í ár verður tað so helst B68, sum fer beinleiðis upp, men onnur lið hava eisini verið væl við, og tað verður eisini sterk mótstøða, sum dettur úr Formula-deildini. So skulu vit hava nakran møguleika her, so er sera umráðandi, at vit brynja okkum sera væl, staðfestir AB-formaðurin at enda.

# Útisetarnir vunnu

**Bæði hjá Tromsø og SK Århus gjørdist talan um sigrar um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið spældu Rúni Weihe og Bárður B. Mikkelsen báðir við liðnum hjá Tromsø, sum spældi tveir dystir í Oslo.

Leygardagin móti Lier, sum er nýtt lið í bestu norsku deildini, og hendan dystin vann Tromsø 3-1. Sunnudagin spældu teir so móti Oslo Volley, og hesa ferð gjørdist talan um tryggan 3-0 sigur.

Og eisini í Danmark spældi ein føroyskur útiseti. Juanna S. Joensen er aftur í ár partur av liðnum hjá SK Århus, og tær spældu leygardagin móti Frederiksberg Volley. Hetta var ein dystur, sum Århus helst skuldi vinna, um tær ætla sær at verða partur av endaspælinum í elitubólkinum. Og tað eydnaðist eisini at vinna dystin. Við settúrslitunum 25-11, 25-12, 14-25 og 25-21 fekk SK Århus ein týdningarmiklan 3-1 sigur, soleiðis at tær enn eru við í dystinum um seinastu seks plássini.

# Føroya Bjór Simultan útsett

**Arbeiðsstegðurin ávirkar nú eisini kappingarnar hjá Føroya Bridge Samband. Eftir skránni hjá Føroya Bridge Samband skuldi Føroya Bjór Simultan kappingin verið leikt leygardagin 22. oktober**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*



*Arbeiðssteðgurin á almenna arbeiðsmarknaðinum tarnar nú eisini bridge-kappingum kring landið*

Føroya Bjór Simultan kappingin er tann stórsta kappingin, ið Føroya Bridge Samband skipar fyri. Hon verður leikt kring allar føroyar í senn. Spælt hevur verið í Vági/Tvøroyri, í Vágunum, í Eysturoynni, Í Havn og í Klaksvík.

Í fjør luttóku áleið 120 bridgespælarar í Føroya Bjór Simultan, sum varð vunnin av Jákup Hjaltalin og Boga Simonsen.

## Nýggja Bridgefelag 40 ár

Í ár eru tað liðin 40 síðan at Nýggja Bridgefelag var sett á stovn í Havn.

Fyri at hátíðarhalda dagin, ætlaði Nýggja Bridgefelag, at skipað fyri stórari kapping í Bridgehúsinum í Havn við veitslu aftaná.

Orsaka av arbeiðssteðginum er kappingin og veitslan útsett til 28. januar 2006. Tey, sum eru tilmeldað fáa bræv sendandi frá fyrireikarunum hesum viðvíkjandi.